SKÚLIN VIÐ LØGMANNABREYT

# Skrivliga próvtøka 2024

**Góðu næmingar og foreldur í 9. flokki**

Próvtøkurnar standa nú fyri framman.
Niðanfyri eru tíðir og lærugreinir at síggja og á baksíðuni verður kunnað um reglur og forskriftir.

Blíðar heilsanir

Skúlin við Løgmannabreyt

Høgni Joensen
Skúlastjóri

Próvtøkuumsiting: Jón Kragesteen - 510449 - jon.kragesteen@skulin.fo

| **Skrivligar próvtøkur** | **9. flokkur** |
|---|---|
| **Føroyskt**<br>mikudagur 22. mai 2024 | 08:15 – 09:45 Máluppgáva<br>09:45 – 10:15 Steðgur<br>10:15 – 13:45 Framseting |
| **Støddfrøði**<br>hósdagin 23. mai 2024 | 08:15 – 09:15 Fimisrokning<br>09:15 – 09:45 Steðgur<br>09:45 – 13:45 Greiðslurokning |
| **Danskt**<br>fríggjadagin 24. mai 2024 | 08:15 – 09:45 Máluppgáva<br>09:45 – 10:15 Steðgur<br>10:15 – 13:45 Framseting |
| **Enskt**<br>mánadagin 27. mai 2024 | 08:15 – 09:45 Máluppgáva<br>09:45 – 10:15 Steðgur<br>10:15 – 13:15 Framseting |

**Vend**

## Reglur um royndir

**Reglur**

- Næmingarnir skulu sita klárir í royndarhølinum kl. 08:00 dagsetta dagin.
- Um so er, at næmingur møtir ov seint, skal viðkomandi møta á skrivstovuni - ella ringja til Jón á 510449.
- Um næmingur ikki fær møtt, skal skúlin hava boð frá foreldrunum um tað.
- Í royndarhølinum er friður!
- Hevur næmingur spurning, skal hondin verða rætt upp, og so er at bíða til vaktin kemur. Loyvt er ikki at rópa ella at gera annað tekin.
- Næmingar hava ikki loyvi til at reisa seg frá stóli sínum, uttan við loyvi frá vakti.
- Næmingar skulu ikki samskifta við nakran annan enn vaktirnar.
- Fartelefonir skulu vera sløktar og lagdar á avtalað stað.

## Brot á fyriskrivaðu reglurnar kann føra til burturvísing

**Føroyskt, danskt og enskt**

- Royndirnar verða gjørdar á telduni, sum næmingarnir hava fingið frá skúlanum
- Næmingar skulu hava sítt egna "headsett" við.
- Næmingar, sum hava brúk fyri at lána "headsett" frá skúlanum, skulu boða frá á skrivstovuni í seinasta lagi fríggjadagin **17. mai 2024, kl. 12**.
- Næmingurin kann brúka teldutøkar orðabøkur, sum t.d. www.sprotin.fo

**Fimisrokning**

- Royndirnar verða gjørdar á telduni, sum næmingarnir hava fingið frá skúlanum
- Í fimisrokning verður dentur lagdur á høvuðrokning. Ikki er loyvt at nýta roknimaskinu og heldur ikki forrit á telduni, sum kunnu nýtast sum roknimaskinur.
- Loyvt er at nýta bókina ”Støddfrøði – handbók”.

**Greiðslurokning - verður gjørd á pappíri!**

Her verður dentur lagdur á tað, ið vanliga verður nevnt ”problemrokning”. Her má næmingurin í størri mun skilja uppgávuna, finna upplýsingar til spurningarnar og loysa teir. Loysnin kann ikki standa einsamøll, men ein frágreiðing má vera, ið vísir, hvussu næmingurin er komin fram til loysnina.

<u>Amboð at hava við til royndina í greiðslurokning eru</u>:

- Blýantur
- Pennur
- Viskileður
- Linial
- Passari
- Vinkulmátari
- Tríkantur
- Roknimaskina
- ”Støddfrøði – handbók”
- Bøkur og annað tilfar úr undirvísingini